# BILATORGIÐ

**Føroyski brúktbilamarknaðurin - í Sosialinum hvønn hósdag**



**FORD ESCORT 1.8 HATCHBACK »DIESEL«**
Árg Dec. 96, Km 105.000.
Vælhildin í góðum standi.
Kr. 76.000,-



**KIA SEPHIA 1.5 GTX SEDAN**
Árg Mar-97, El. rútar- el. spegl Centrallás-Spoylara- Alufelgur v.m. Kr. 66.000,-



**FORD ESCORT STATIONCAR 1.8 »DIESEL «**
Árg okt.95, Km 104.500. Vælhildin í góðum standi. Kr. 74.000,-



**FORD ESCORT 1.8 »DIESEL«**
F 52.289
Árg Okt. 95, Vælhildin . Centrallás -Radio v.bandspælara-El.Spegl v.m.. Kr. 64.000.



**MITSUBISHI LANCER 1.6 GLXI**
Árg juli.95, Km 114.000. Vælhildin í góðum standi.Alufelgur-El.rútar-El.spegl-Radio v.bandsp.-Spoylari aftan v.m.. Kr. 74.000,-



**MAZDA 626 2.0 HATCHBACK**
Árg Nov. 96, Km 66.000. Vælhildin . Centrallás -El rútar -Radio v.bandspælara-El.Spegl. v.m.. Kr. 95.000,-



**DAEWOO NUBIRA 1.6 STATIONCAR**
Árg Juni.98, Km 29.000. Sera vælhildin. El rútar Fr. Takboylar, Radio við bandspælara, Centrallás, Sleipikrók.Bert km 29.000. Kr. 94.000,-

Pf. D. B. Bilar
**Jónas Broncksgøta 15**
**Tel. 310600 - Fax 310650**



**CITROEN ZX 1.9TD 5H**
Árg mai'97, Km 160.000.
Kr. 85.000,-



**CITROEN XSARA 1.9TD 5H**
Árg Aug'98, Km 110.000.
Kr. 115.000,-



**CITROEN XSARA 1.9TD WEEK.**
Árg Okt'98, Km 77.000.
Kr. 115.000,-



**NISSAN SERENA 2.3D**
Árg Mai'97, Km 88.000.
Kr. 88.000,-



**CITROEN SAXO 1.5D 3H**
Árg Jan'01, Km 44.000.
Kr. 99.000,-



**TOYOTA COROLLA 1.3I**
Árg Feb'01, Km 24.000.
Kr. 103.000,-



**VOLKSWAGEN VENTO 1.9D**
Árg apr'94, Km 82.500.
Kr. 71.000,-



**NISSAN SERENA 2.3D**
Árg Mai'97, Km 102.000.
Kr. 88.000,-



**SUZUKI BALENO 1.3I**
Árg Apr'00, Km 27.500.
Kr. 99.000,-



**CITROEN SAXO 1.5D 3H**
Árg Juli'97, Km 120.000.
Kr. 80.000,-

**VØRUVOGNAR**



**CITROEN JUMPER 2.5TD LH**
Árg Aug'96, Km 120.000.
Kr. 120.000,-

CITROËN Mercedes-Benz MITSUBISHI MOTORS
**Ivan Johansen Bilar**
Tel 313666 • www.ivan.fo •e-mail: ivan@ivan.fo

# LÝSIÐ

við



brúktum

bilum

í Sosialinum



**OPEL ASTRA 1.8 STW**
Árg okt. 95, Km 64.000. Sýnaður .
Kr. kr 79.000 .
Uttan býtisbil kr. 69.000,-



**TOYOTA CARINA 1.6 STW**
Árg mei.89, Km 145.000.
Sýnaður 04.07.02. Kr. 45.000,-
Uttan býtisbil kr. 38.000,-



**HONDA ACCORD 1.8**
Árg apr 98, Km 84.000.
Sýnaður 06.06.02. Kr. 124.000.
Uttan býtisbil kr. 112.000,-



**RENAULT LAGUNA 1.8 H/B**
Árg okt. 01, Km 19.000.
kr. 199.000,-
Uttan býtisbil kr. 189.000



**RENAULT MEGANE 1.6 SEDAN**
Árg jun 00, Km 64.000.
Kr. 129.000,-
Uttan býtisbil kr. 119.000,-



**VOLVO 460 DL**
Árg nov. 91, Km 180.000.
Sýnaður 13.11.02. Kr. 55.000.
Uttan býtisbil kr. 45.000,-



**PEUGEOT 405 GTX TD**
Árg des.95, Km 168.000. Sýnaður 04.09.00. kr. 79.000,-
Uttan býtisbil kr. 65.000,-



**TOYOTA COROLLA 1.6 SEDAN**
Árg mei 99, Km 55.000.
Kr. 119.000,-
Uttan býtisbil kr. 109.000,-

VOLVO RENAULT VR BILAR
Hoyvíksvegur
tel 322110


# Bilar

Nr. 25 • hósdagur • 6. februar 2003 • 77. árg.




*Niels Petur Olsen, koyrilærari: forboðsskeltið sum hevur staðið á húsinum yvirav dómhúsinum hevur verið burtur í longri tíð. Tað vil siga, at ein bilførari sum einki veit um at eitt skelti "møguliga" eigur at vera har kann koyra allan vegin, heilt oman á Vaglið. Eisini grannar hava ampa av hesi støðuni og hava klagað til avvarðandi myndugleikar*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Niels Peter Olsen koyrilærari:

# Tilvildin ræður í ferðsluni

**Niels Peter Olsen er útbúgvin sum bilmekanikari. Eftir at hava arbeitt sum bilsmiður í mong ár, hevur hann nú fingið sær útbúgvin sum koyrilærari. Hann heldur, at tað ofta er, sum tilvildin ræður í ferðsluni í Havnini.**


KOYRIFRÁLÆRA
*Magnus Gunnarsson*


"Tá tú hevur tikið tína koyrilæraraútbúgving í einum landi sum Danmark, og koyrt í ferðsluni har eina tíð, verur tú skjótt varur við, at her hjá okkum er tað ov ofta, eins og tilvildin ræður". Hetta sigur argjamaðurin Niels Peter Olsen, ið byrjaði sum koyrilærari í Havn í 2001. Tá ein koyrilærari koyrir við sínum næmingum, hevur tað stóran týdning, at øll skeltini í býnum venda rætt og síggjast væl. Ein trupulleiki í Havn er, at tá vegskeltir av eini ella aðrari orsøk eru tikin niður, gongur alt ov long tíð, til tey verða sett upp aftur. Sum dømi nevnir Niels Peter Nólsoyar Pálsgøtu, frá Dómhúsinum oman til Tinghúsvegin, har var bert loyvt at koyra niðan eftir frá Tinghúsvegnum av. Hetta vita øll sum vanliga koyra í býnum. Men forboðsskeltið sum hevur staðið á húsinum yvirav dómhúsinum hevur verið burtur í longri tíð. Tað vil siga, at ein bilførari sum einki veit um at eitt skelti "møguliga" eigur at vera har kann koyra allan vegin, heilt oman á Vaglið. Einki skelti er sum vísir, at hann ikki kann gera tað. "Hetta gevur trupulleikar hjá okkum koyrilærarum, sum skulu læra næmingarnar at koyra eftir teimum ásettu reglunum". Niels Peter sigur, at hann hevur tosað við avvarðandi myndugleikar, uttan at nakað er hent.

## Krevjandi útbúgving

Niels Peter er annars útbúgvin bilmekanikari. Hann lærdi á bilverkstaðnum hjá Edvin Hammer á Undir Heygnum og arbeiddi í fleiri ár á Shellstøðini á Frælsinum og á bilasøluni hjá Øssur Johannesen í Hoyvík. Tað vísti seg seinni, at hann fekk trupulleikar við heilsuni av at arbeiða við olju og lakki o.l. Í 2000 gavst hann at arbeiða við bilum og arbeiddi eitt skifti sum bilførari hjá Postverkinum, áðrenn hann fór niður til Danmarkar at fáa sær útbúgving sum koyrilærari við ársbyrjan 2001. Tað er ein sera krevjandi útbúgving, sum tekur umleið eitt ár. Heim afturkomin byrjaði hann beinanvegin at arbeiða sum koyrilærari. Saman við Bjarka Johannesen heldur Niels Peter eisini ferðslutrygdarskeið fyri starvsfólkum hjá ymiskum fyritøkum sum til dømis oljufelagnum Shell. Hóast ferðslan er nógv, og ein skal hava gott tol, trívist Niels Peter annars væl í starvinum sum koyrilærari í Havn.